# Stórur countrydansur í Vestmanna

**Leygarkvøldið verður stórt dansitiltak í Vestmanna, tá áhugaverdur countrydansur verður**



DANSUR

Tað eru fyrireikararnir aftan fyri MC & Countryfestivalin, sum verður komandi ár, og Vestmanna Kappróðrarfelag, sum vóna at fáa fólk úr øllum landinum at leita sær í dansin.

Fyriskipararnir hava leitað fram teir allarbestu tónleikarnar at spæla.

Nýggi og sera vælumtókti countrybólkurin Fellowship, sum júst er komin aftur av sera væleydnaðari konsertferð í Hetlandi, fer at spæla. Teir, ið manna bólkin eru: Fimmbogi Lisberg sang, Rúni Lisberg sang, Ólavur Øster gittar, Jákup Zachariasen steel gittar, Jógvan Olsen klaver, Pauli Magnussen bass, Jónleif Jensen trummur. Hesi nøvn skuldu borga fyri góðsku.

Tað verður eisini gjørt nógv burturúr at fáa sang og tónleik so fjølbroyttan sum gjørligt, og tí verður eisini ein gestasangarar bjóðaðir við.

Eitt nú kemur Noel Joensen sangari í Countrybólkinum í Klaksvík at syngja.

Joen Magus Danielsen, ið millum annað syngur sangin, "góða mamma", verður eisini eisini við.

Seinast countrydansur var í Vestmanna, var høllin stúgvandi full, og tí hava fyriskipararar lagt doyin á, at stranga 18 ára aldursmarkið aftur verður hesaferð.

Í samband við Countrydansin kemur Sarita Funn at skipa fyri LINE DANSI millum kl. 23.00 og 24.00, og tí ræður um at møta upp stundisliga.

Í Vestmanna og annars í Norðstreymi sum heild, er line dansur sera væl umtóktur og tí kann væntast, at stórur hópur av linedansarum koma til countrykvøldið.

Sarita Funn kemur at hava skeið í line dansi í samband við hetta tiltakið.

Dansurin tann 30. september er upptakt til fleiri slík dansitiltøk komandi mánaðirnar.

Í ár hava stigtakararnir valt at lata avlopið av countrydansinum fara til Vestmanna Kappróðrarfelag, sum ætlar sær at keypa rógvimaskinur, og tí fer peningurin hesuferð til hetta endamál.

Nú tað eisini verður ókeypis at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin tann 30. september, vóna fyrireikararnir, at nógv fólk eisini koma har frá.




## Verkætlanarfólk til KT menning

**Vit styrkja okkara kt-menningarøkið, og sóknast tí eftir starvsfólki.**

Saman við einum framfýsnum toymi verður tú við til at menna og røkja okkara tryggingarskipanir. Tú kemur at arbeiða nógv við verkætlanum, ið krevja innlit, samskipan og verkseting, og tí mást tú duga væl at samskifta.

Vit nýta tryggingarskipanina, TIA, sum er ein framkomin og altjóða skipan, ið verður nýtt í 40 tryggingarfeløgum í 18 londum kring um í heiminum. Aðrar skipanir, sum vit nýta til heimasíðu, intranet, tilgongdir og hagtøl, eru eisini natúrligur partur av menningarøkinum.

**Starvið**
Vit kunnu bjóða eitt starv, sum fevnir rættiliga breitt í einum spennandi umhvørvi. Starvið inniheldur nógvar avbjóðingar, og tú fært møguleikan at ávirka gongdina í einum nýggjum og slóðbrótandi felagi.

Arbeiðsuppgávurnar fevna millum annað um kt-verkætlanir har samskipan, samskifti og íverksetan eru av stórum týdningi.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur, um tú hevur arbeitt við verkætlanum og hevur royndir við verkætlanarleiðslu.Tú hevur eina hóskandi kt-útbúgving ella viðkomandi royndir.

Persónliga ert tú fyrikomandi. Tú arbeiðir sjálvstøðugt og ert samstundis ein góður viðleikari. Tú dugir at gera tað torføra einfalt, tú hevur ábyrgdarkenslu og vilt veita eina góða tænastu.

**Setan, umsókn og freist**
Starvið verður sett sum skjótast og lønin verður ásett eftir avtalu í samsvari við royndir og førleika.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi áðrenn 15. oktober 2006.

Send tína umsókn við lívsgongdarlýsing (CV) til:
Tryggingarfelagið Føroyar
att. Starvsfólkadeildin
Kongabrúgvin
Postboks 329, FO-110 Tórshavn

Umsóknin kann eisini sendast við teldupostí til: starvsfolkadeild@trygging.fo

Vilt tú vita meira um starvið, kunnu spurningar setast Óluvu Poulsen á telefon 215594 ella teldupost op@trygging.fo. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Postboks 329, 110 Tórshavn
Tel 345600, Fax 345601
tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

*Tryggingarfelagið Føroyar P/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn, og 5 deildir kring landið. Í felagnum starvast 118 fólk.*

sansir.fo


# Gerðarrætturin fingið skrivstovu

ARBEIÐSMARKNAÐUR

Tann 1. apríl var Fasti Gerðarrætturin settur á stovn. Uppgávan er at loysa trætur á arbeiðsmarknaðinum.

Fasti Gerðarrætturin hevur síðani skipað skrivstovu í samstarvi við Arbeiðsloysisskipanina. Eisini er heimasíða løgd til rættis við yvirliti yvir sáttmálapartar, reglugerðum um mannagongdir og gjøld, úrskurðarsavni, og ymsum kunnandi tilfari.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava sett Fasta Gerðarrætt á stovn við sáttmála. Løgtingið hevur samtykt løg um mál, ið hoyra undir Fasta Gerðarrætt, ið heimilar, at landið stuðlar stovninum.

Landið sum arbeiðsgevari er eisini partur í sáttmálanum. Partarnir binda seg til at lata Fasta Gerðarrætt gera av trætumál um brot á sáttmála, marknamál, óheimilað stríðsstig og aðrar líkar trætur í sáttmálaskeiðinum.

Partarnir kunnu eisini velja at lata Fasta Gerðarrætt gera av trætumál um tulking av sáttmála og tílíkar trætur í sáttmálaskeiðinum; hetta kunnu partarnir gera í hvørjum máli sær ella í fakligu (kollektivu) sáttmálunum millum arbeiðsgevarafeløg og løntakarafeløg.